Vikuskiftið Sosialurin

Nr. 205 - 24. oktober 2008




# McCain stríðist

**Valstríðið í USA er komið í hæddina, og teir báðir kandidatarnir brynja seg nú til teir seinastu og avgerandi leikirnar undan valinum tann 4. november. Barack Obama hevur seinastu vikurnar ligið langt framman fyri í veljarakanningum, og fleiri hildu av valið var avgjørt frammanundan. Men McCain hevur áður víst, at hann ikki gevur skarvin yvir uttan svørðslag, og álopini ímóti Barack Obama gerast alsamt hvassari og skitnari**

FORSETAVAL

*Stefan í Skorini*

Um smáar tvær vikur skal tann amerikanski veljarin kjósa sær ein nýggjan forseta at stjórna heimsins máttmiklasta landi úr Hvítu Húsunum.

Og tendensurin undan valinum er púra greiður. Tann ungi og óroyndi Barack Obama stendur í løtuni til at vinna ein greiðan sigur á tí royndu rottuni John McCain. Tað hevur næstan ligið í luftini, at spurningurin bert er, hvussu stórur munurin fer at vera. Men seinastu dagarnar er munurin millum báðar kandidatarnar tódnaður, og McCain sær sær ein lítlan møguleika fyri at venda skútuni.

### Stórur munur

Eingin ivi er tó um, at McCain fær ein sera tungan róður komandi dagarnar. Hóast veljarakanningarnar eru sera ymiskar, hevur Obama eina greiða leiðslu um alt landið. Undirtøkan fyri Barack Obama sum forseta liggur í teimum flestu kanningunum um hálvthundrað prosent, meðan John McCain bert fær undirtøku frá eini 43-44 prosentum í teimum bestu kanningunum.

Eitt er, hvussu stóra undirtøku kandidatarnir fáa í miðal um alt landið, men tann stóri spurningurin er hinvegin, hvussu nógvar valmenn teir kunnu fáa í teimum einstøku statunum. Eisini her er Barack Obama greitt frammanfyri.

Demokratiski kandidaturin fær í løtuni eini 250 valmenn, ið kunnu metast at vera tryggir, meðan republikanski mótstøðumaðurin bert hevur eini 150 tryggar valmenn. Vinnarin skal hava minst 270 valmenn, og tí skal Barack Obama bert vinna í einum ella tveimum sokallaðu stríðsstatunum, har munurin millum kandidatarnir er lítil ella eingin.

Myndin í veljarakanningunum er tí greið: Barack Obama verður næsti forseti amerikumanna.

### Obama trýstir McCain á heimavølli

Dysturin millum Obama og McCain er alt annað enn javnur. Demokratiska valevnið hevur nevnliga meira enn tvífalt so nógvan pening sum republikanarin. Onkur metir enntá, at Obama hevur tríggjar ella fýra ferðir so nógvan pening í kassanum. Tí hevur Barack Obama ein ovurstóran fyrimun, og hetta hevur hann megnað at gagnnýtt til fulnar.

Bara í september savnaði Barack Obama 150 milliónir dollarar, og einki valevnið hevur nakrantíð fingið so nógvan pening inn uppá bert ein mánað. Barack Obama lovaði annars, at hann bert ætlaði at føra valstríð fyri almennar pengar, men tá hann varnaðist, at innsavningin gekk nógv betri enn væntað, valdi hann at bróta hetta lyftið.

Hetta merkir, at Barack Obama hevur ráð til at føra eitt meira breitt valstríð í øllum teimum statum, har hann hevur ein møguleika at vinna. Og demokratarnir hava eisini fingið óvæntaða undirtøku í statum, sum vanliga altíð seta krossin við ein republikanara. Tí er McCain noyddur at verja